# ítróttur

Nr. 17 • leygardagur • 25. januar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Nú er álvara

**Eftir mánaðarlangan steðg orsakaðan av landsliðnum, fara bestu mansliðini nú undir endaspælið í hondbólti**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Meðan strandingar hava frí hetta fyrsta vikuskiftið í endaspælinum, hava Neistamenn og Vestmenningar møguleikan at fara í útbrot, tá teir sunnudagin spæla sínar fyrstu dystir í endaspælinum.

Best fyri í so máta er helst Neistin, sum á heimavølli skal royna seg móti H71. Í øllum førum á pappírinum er hetta ein mótstøða, sum skuldi verið til at livað við, og einki er at ivast í, at teir bláu her leggja seg eftir báðum stigunum.

Megnar liðið at halda fast um stríðsandan og skilagóða spælið, sum eyðkendi grundspælið fyri teirra viðkomandi, er heldur einki at ivast í, at talan verður um tvey stig. Hinvegin er talan um eina grannauppgerð, og tí eiga neistamenn ikki at taka nakað fyri givið. Hoyvíkingar fara í øllum førum at stríðast av øllum alvi, soleiðis at teir møguliga kunnu vera við til at arga oddin, og samstundis lyfta seg sjálvar úr verandi botnstøðuni.

Har stríðast teir í løtuni við Tjaldur og KÍF, og júst hesi bæði liðini hittast í Runavík sunnudagin. Mett eftir gongdini í grundspælinum eigur hetta at vera ein dystur, sum kollfirðingar skulu vinna. Ikki minst nú teir aftur hava Regin Petersen tøkan.

Hinvegin hevur Tjaldur fleiri ferðir í ár sýnt, at liðið er mest sum fullkomuliga óútrokniligt. Tí kann í nógvar mátar sigast, at Tjaldur sjálvur gera av, hvussu lagna teirra verður sunnudagin. Er lagið gott, kann KÍF rokna við eini sera truplari uppgávu, meðan talan hinvegin eisini kann vera um avgreiðsluspurning, um runavíkingar ikki taka uppgávuna í tí álvara, sum hon eigur at takast í.

## Lív í aftur klassikaran

Einki er at ivast í, hvør stórdysturin hetta vikuskiftið verður. Kyndil hevði undan kappingarárinum stórar ætlanir um at endurvinna støðuna sum eitt av fremstu feløgunum í landinum, men higartil hevur seinasta pettið restað í, til tess at náa hesum máli.

Enn er munurin tó ikki stórur, men skulu teir grønu fylgja við, so er kravið tvey stig, nú teir fara til Vestmanna. Í øllum førum ein tung uppgáva, men kanska ikki heilt ógjørlig. Í øllum førum megnaði Kyndil at vinna sær ein javnleik í seinna dystinum móti VÍF í grundspælinum, og hóast hetta ikki kastaði nakað stig við sær til endaspælið, so er lítið at ivast í, at hetta er góð sálarlig barlast hjá liðnum at hava, nú klassiska uppgerðin stendur fyri framman.

Hjá VÍF stóð einki til, tá teir mikudagin taptu fyrru hálvfinaluna ímóti StÍF. Ikki tí, mett eftir fortreytunum, so stóð liðið seg væl, nú hvørki Áki ella Ingi Olsen vóru við, men tað sigur seg sjálvt, at slíkir leikarar eru tungir at vera fyriuttan.

Nú er tó líkt til, at tað verður eitt at kalla fullmannað VÍF-lið, sum fer at taka ímóti Kyndli. Ingi Olsen, sum var í Danmark í barsilsørindum, er nú blivin pápi, og í Vestmanna verður í øllum førum vónað, at hann verður við sunnudagin. Áki Olsen er eitt sindur meira ivasamur. Hann hevur drigist við ein fipurskaða, og spurningurin er, hvørt tað er ov vágið, um hann longu nú fer á vøllin aftur. Endaliga var eisini ivamál um John Zachariasen, sum stríðist við ein eyman lærkrika, men sum skilst verður eisini hann við sunnudagin.

Og nú tykist loksins, sum um klassikarin í føroyskum manshondbólti er um at vinna nakað av fortíðarinnar tign aftur. Í øllum førum tykist tað vera ætlanin, at havnarmenn fara at skipa fyri bussferð til Vestmanna, og um hetta verður so, er lítið at ivast í, at talan verður dyst fyri fullsettari høll.



*Neistamenn hava á pappírinum góðar fortreytir fyri at fara frá strandingum, tá teir á heimavølli hitta hoyvíkingar*

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

1. deild kvinnur

| | |
|---|---|
| 26.01 14.30 | Neistin-VB |
| 26.01 14.30 | Tjaldur-Stjørnan |
| 26.01 14.30 | VÍF-Kyndil |

1. deild menn

| | |
|---|---|
| 26.01 16.00 | Neistin-H71 |
| 26.01 16.00 | Tjaldur-KÍF |
| 26.01 16.00 | VÍF-Kyndil |

**Coca-Cola kappingin, kvinnur**

| | |
|---|---|
| 25.01 15.00 | VB-Neistin |

**Flogbóltur**

Meistaradeild kvinnur

| | |
|---|---|
| 26.01 13.00 | Fleyr-Mjølnir |
| 26.01 14.00 | Dráttur-TB |

Meistaradeild menn

| | |
|---|---|
| 26.01 15.00 | Fleyr-Mjølnir |
| 26.01 15.00 | Fram-ÍF |



Stjørnan-VÍF 18-17 (9-9):

# Stjørnan tók fyrsta stikkið

**Alt er framvegis púrasta opið ímillum Stjørnuna og VÍF, eftir at Stjørnan rættiliga óvæntað vann fyrru hálvfinaluna millum liðini bæði**

COCDA-COLA KAPPINGIN, KVINNUR
*Jákup Mørk*

At steypakappingin er kappingin, har óvæntaðu úrslitini oftast koma fyri, gav hóskvøldið enn eitt livandi dømi um.

Tað var nevnliga einki at ivast í, at VÍF var greiður favorittur, tá tær hósdagin vóru í Klaksvík, har fyrra hálvfinalan millum liðini stóð á skránni. Tríggjar ferðir áður høvdu liðini hitst í landskappingini, og hvørja ferð við tryggum VÍF sigri sum úrsliti.



*Hóast VÍF vóru greiðir favorittar, so eydnaðist Stjørnuni at basa teimum gulu í fyrru hálvfinaluni, tá liðini leiktu hóskvøldið*

## Løgdu seg ikki

Stjørnan var tó ongan tíð sinnað at lata sær lynda leiklutin við aðru violin hesaferð. Alt fyri eitt løgdu tær út við at trýsta VÍF, sum hinvegin als ikki tóktist vera koma fyri seg eftir óvæntaða javnleikin á Skála herfyri.

Tað var tó ongan tíð so, at Stjørnan slapp at renna undan VÍF, men tær hildu seg fyri tað mesta beint frammanfyri. Serstakliga hildu tær fast í verjupartinum, men tá tær hinvegin heldur ikki megnaðu at spæla seg ígjøgnum VÍF-verjuna, sluppu tær iki rættiliga avstað.

Seinna umfarið var tað, sum um VÍF nú hevði fingið nakað av ferð á. Í øllum førum hildu tær nú enn betur fast í verjuni, men hinvegin gekst framvegis sera striltið at fáa bóltin framvið Agnes Masenaite. Fimm minuttir fyri leiklok høvdu tær tó strítt seg upp á eina at síggja til trygga trý mála stóra leiðslu, og so skuldi tann dysturin sum so verið liðugur.

Men so stóð púrasta fast hjá VÍF. Seinastu løtuna av dystinum skeyt Stjørnan ikki færri enn fýra mál, samstundis sum VÍF einki fekk, og tryggjaðu tær sær sostatt sigurin, tó at hesin í sjálvum sær ikki nýtist at merkja so nógv.

Tað er nevnliga so, at verður hesin sigurin ikki fylgdur upp í seinna dystinum, so verður tað kortini VÍF, sum fær finaluplássið. Skulu tær tað, so krevur tað tó heilt annað spæl. Seinastu tvær ferðirnar hevur álopið verið óvanliga hugflogsfátækt, og tó at verjan framvegis er sera sterk, so verða snøgt sagt ov fá mál skotin frá teimum gulu.

### Dysturin í tølum

**Stjørnan-VÍF 18-17 (9-9)**

Málskjúttar:

Stjørnan: Danijela Ercevic 6(1), Natasha Stamencovic 5(1), Jastrid Gullaksen 2, Bára S. Klakstein 3, Joan M. Joensen 2, Súsanna Hansen 1

VÍF: Nicoleta Radu 6, Sóley Mikkelsen 4(1), Fríða Marjunardóttir 4(2), Alis Høghamar 1, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 1, Jacklin Durhuus 1

Brotskøst: Stjørnan 3, VÍF 3

Útvísingar: Stjørnan 4, VÍF 3

Dómarar úr Tjaldur: Trygvi Mortensen & Hartvig Joensen.

# Brak í Vestmanna

**Meðan pílurin hjá Kyndli peikar beint uppeftir, tyksit VÍF at vera hálvgum steðgað upp. Tí er lítið at ivast í, at dysturin í Vestmanna millum hesi bæði liðini verður eitt satt brak, har báðir partar fyri alt í verðini skulu hava stig**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eins og hjá monnunum, so verða tríggir dystir leiktir í bestu kvinnudeildini um vikuskiftið, og eins og hjá monnunum, so verður stóri dysturin hesa ferð í Vestmanna, har Kyndil kemur á vitjan.

Fyri bæði einum og tveimum árum síðani var mest sum óhugsandi, at talan her skuldi verið um nakran spennandi dyst, men í ár er støðan nakað øðrvísi í so máta.

Tó at VÍF enn er eitt av avgjørdu oddaliðunum í føroyskum kvinnuhondbólti, so er talan ikki um sama einaveldi, sum hevur verið galdandi tey bæði seinnu árini. Ikki minst er hetta undirstrikað seinastu vikuna, har liðið fyrst spældi javnt á Skála, fyri síðani at tapa fyrru hálvfinaluna móti Stjørnuni hóskvøldið.

Hartil tykist Kyndil í løtuni at vera í ferð við at menna seg til aftur at gerast eitt av oddaliðunum í føroysku kappingini. Eftir ein minni niðurtúr í heyst, har óstøðugt spæl eisini tóktist vera vørumerkið hjá liðnum, er annað lag komið á seinastu dystirnar, og við sigrinum á Neistanum í vikuni mundi liðið eisini sleppa sær av við seinasta kompleksið.

Skal yvirhøvur tosast um kompleks sunnudagin, so er tað kanska VÍF, sum nú er um at fáa eitt slíkt. Hóast óstøðugu avrikini hjá Kyndli í heyst, so vann liðið báðar dystirnar á VÍF, og at hava slíka barlast, má í øllum førum metast sum fyrimunur.

Hvussu verður hesaferð, er ilt at spáa um, men eitt er vist. Hvørgin av pørtunum hevur ráð at missa, og vanliga plagar tað at vera eitt gott útgangsstøði fyri einum góðum hondbóltsdysti.

## 2 X Neistin & VB

Tað eru tó ikki bert VÍF og Kyndil, sum spæla um vikuskiftið. VB, sum alt árið hevur veirð í oddinum, fer hesaferð til Havnar, har Neistin enn einaferð standur fyri teimum. Leygardagin spæla somu lið seinnu hálvfinaluna í Coca-Cola kappingini, og eftir at hava ferðast norður um fjørðin, skulu tey so aftur takast.

Og lítið er at ivast í, at VB er stórfavorittur her. Tær hava verið sterkasta liðið higartil í kappingini, og tá Neistin samstundis tykist hava ein niðurtúr av søguligum dimensiónum, tykist stórvegis ivi ikki valda um hesar dystirnar.

Tað átti tað heldur ikki at gjørt í Runavík, tá Stjørnan kemur á vitjan. Klaksvíkingarnir vunnu hóskvøldið fyrru hálvfinaluna á VÍF, og bara tað sigur nakað um styrkina, sum liðið hevur ognað sær í seinastuni. Tjaldur fekk kanska nakað av gongd á, tá tær vunnul á Neistanum seinasta vikuskiftið, og ivaleyst gevur hetta teimum treysti til at royna eftir fleiri stigum, men alt bendir so á, at tað ikki er í hesum dystinum, at tað verður veruleikin.

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 2 | 1 - 1 - 0 | 325 | 258 | 67 | 11 |
| 2 | VB | 1 | 1 - 0 - 0 | 337 | 283 | 54 | 11 |
| 3 | Kyndil | 1 | 1 - 0 - 0 | 314 | 309 | 5 | 8 |
| 4 | Stjørnan | 1 | 0 - 0 - 1 | 277 | 281 | -4 | 8 |
| 5 | StÍF | 2 | 0 - 1 - 1 | 324 | 352 | -28 | 7 |
| 6 | Neistin | 2 | 0 - 0 - 2 | 275 | 299 | -24 | 5 |
| 7 | Tjaldur | 1 | 1 - 0 - 0 | 263 | 333 | -70 | 3 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 0 | 0 - 0 - 0 | 379 | 299 | 80 | 9 |
| 2 | StÍF | 0 | 0 - 0 - 0 | 350 | 298 | 52 | 9 |
| 3 | Neistin | 0 | 0 - 0 - 0 | 341 | 308 | 33 | 9 |
| 4 | Kyndil | 0 | 0 - 0 - 0 | 319 | 322 | -3 | 6 |
| 5 | KÍF | 0 | 0 - 0 - 0 | 304 | 328 | -24 | 5 |
| 6 | H71 | 0 | 0 - 0 - 0 | 299 | 355 | -56 | 3 |
| 7 | Tjaldur | 0 | 0 - 0 - 0 | 296 | 378 | -82 | 3 |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 13 | 11 - 2 | 37 | 15 | 22 | 14 |
| 2 | Mjølnir | 13 | 10 - 3 | 34 | 13 | 21 | 13 |
| 3 | TB | 13 | 9 - 4 | 32 | 15 | 17 | 10 |
| 4 | Dráttur | 13 | 5 - 8 | 20 | 32 | -12 | 5 |
| 5 | Fleyr | 13 | 3 -10 | 12 | 32 | -20 | 5 |
| 6 | KÍF | 13 | 1 -12 | 8 | 36 | -28 | 1 |

**Meistaradeild, menn**

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 10 | 10 - 0 | 30 | 2 | 28 | 12 |
| 2 | Fram | 10 | 6 - 4 | 22 | 14 | 8 | 8 |
| 3 | SÍ | 11 | 5 - 6 | 17 | 20 | -3 | 7 |
| 4 | Mjølnir | 10 | 5 - 5 | 18 | 18 | 0 | 5 |
| 5 | Fleyr | 11 | 0 -11 | 0 | 33 | -33 | 0 |

## Máltindarnar

**Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Daiva Tuomaite | VB | 108 | (23) |
| Asta Petrauskiene | StÍF | 108 | (34) |
| Simona Dziugyte | Neistin | 95 | (29) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 95 | (34) |
| Danijela Ercevic | Stjørnan | 89 | (25) |
| Milica Ergic | Tjaldur | 86 | (18) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 86 | (46) |
| Reda Kurkauskiene | VB | 81 | (10) |
| Alina Olaru | StÍF | 69 | (7) |
| Lenka Ribaric | Tjaldur | 64 | (16) |
| Natasja Stamenkovic | Stjørnan | 60 | (3) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 55 | (6) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 54 | (1) |
| Poula D. Olsen | StÍF | 50 | (4) |
| Laila Jespersen | VB | 48 | |

**Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 108 | (14) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 88 | (15) |
| Damir Oros | KÍF | 87 | (20) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 81 | (2) |
| Morgan Knezevic | Neistin | 80 | (19) |
| Ingi Olsen | VÍF | 76 | (17) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 70 | (6) |
| John Zachariasen | VÍF | 67 | |
| Áki Olsen | VÍF | 64 | (5) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 58 | (12) |
| Áki Mørk | Neistin | 55 | (13) |
| Finnur Hansson | Kyndil | 53 | (10) |
| Artur Johansen | StÍF | 49 | (12) |
| Niels Viggo Niclassen | H71 | 48 | |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 48 | (17) |